# Listaframsýning á ólavsøku

**LIONS CLUB TÓRSHAVN** skipar fyri listaframsýning í útvarpshøllini á ólavsøku. Ætlanin er at sýna fram oljumálningar, akvarellir, tekningar, klipp, leirlist v.m.

Hevur tú hug at vera við, set teg so í samband við LIONS CLUB TÓRSHAVN, tlf. 31 48 42 – 31 42 23 – 31 25 38 so skjótt sum til ber, ella í seinasta lagi 03.07.98.

**LIONS CLUB TÓRSHAVN**

# Aðalfundur

Aðalfundur verður í høllini á Stórheyggi 13. juni kl. 19.00.

Skrá:
- Frásøgn um virki í farna ári
- Framløga av roknskapi
- Bygnaðar- og lógarbroytingar
- Nevndarval
- Ymiskt

**Havnar Fimleikafelag**

# Starv hjá Føroya Skúlabókagrunni

Eitt starv hjá Føroya Skúlabókagrunni verður lýst til setanar frá 1. august 2000.

Starvið fevnir í høvuðsheitum um praktiskt útgávuvirksemi, ráðgeving og vegleiðing í sambandi við útgávu av fjølbroyttum undirvísingarmiðlum. Ein partur í starvinum verður at kunna seg við tørvin á nútíðarbærum undirvísingarmiðlum, lærugreinum og undirvísingarevnum, eina helst í fólkaskúlanum, eisini í teld og teldutøkum útgávum. Upplæring kann verða neyðug.

Til starvið krevst læraraútbúgving til fólkaskúlan, í minsta lagi 5 ára undirvísingarroyndir, dyggur fakligur førleiki og hollur kunnleiki í føroyskum og í teld.

Løn og setanartreytir verða eftir sáttmála við Føroya Lærarafelag og við góðkenning Fíggjarmálastýrisins. Royndartíðin er eitt ár.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skal vera skúlabókanevndini í hendi í seinasta lagi 6. juni 2000. Gjølligari upplýsingar um starvið fáast frá skrivaranum í skúlabókanevndini, Heðini M. Klein, telefon 316100.

Tórshavn, 5. mai 2000

**Føroya Skúlabókagrunnur**
**Skúlabókanevndin**
Lützenstrøð 4 · FO-100 Tórshavn
Telefon 316100

# Søvnini í summar

**Í summar verður opið soleiðis:**

**Føroya Fornminnissavn tlf. 318076**
**Framsýningarnar í Brekkutúni 6 og Heima á Garði, Hoyvík**
Í tíðarskeiðnum 20. mai-31. august:
Mánadag-fríggjadag kl. 10-17
Leygar- og sunnudag kl. 14-17

**Avgreiðslan:**
Kúrdalsvegi 2, Hoyvík kl. 9-12
& kl. 13-15

**Føroya Náttúrugripasavn tlf. 312306**
Framsýningarnar á Debesartrøð:
Í tíðarskeiðnum 5. juni-31. august:
Mánadag-fríggjadag kl. 11-16
Leygar- og sunnudag kl. 15-17

**Føroya Landsskjalasavn tlf. 316677**
Í tíðarskeiðnum 1. juni-31. august er lesistovan opin:
Mánadag, týsdag, hósdag og fríggjadag kl. 11-16
Mikudag og leygardag stongt

**Føroya Landsbókasavn tlf. 311626**
Í tíðarskeiðnum 21. juni-14. august:
Mánadag-fríggjadag kl. 13-17

**Býarbókasavnið tlf. 313626**
hevur opið sum vant:
Mánadag-fríggjadag kl. 10-18
Leygardag kl. 10-13

**Listasavn Føroya tlf. 313579**
Í tíðarskeiðnum 1. juni-1. september:
Mánadag-fríggjadag kl. 11-17
Leygar- og sunnudag kl. 14-18

Tórshavn, 26. mai 2000
**Søvnini**

# Verkfrøðingur

Tórshavnar havn søkir eftir verkfrøðingi til at standa fyri teknisku umsitingini av bryggjum, bygningum o.ø. ognum hjá havnini eins o.ø. fyrireikandi og umsitandi arbeiði.

Roknað verður við at umsøkjarin hevur royndir innan bygging/eftirlit/projektering, at hann kann samskifta á enskum og hevur kunnleika til EDV.

Umsøkjarin skal hava lætt við at samskifta, kunna arbeiða sjálvstøðugt, vera røkin og hava vilja til at søkja nýggja vitan.

Tórshavna havn kann bjóða eitt sjálvstøðugt og spennandi starv við nógvum avbjóðingum fyri framman.

Løn sambært sáttmála.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Tórshavnar havn.

Umsóknir saman við skjølum og møguligum viðmælum skulu sendast til

**Tórshavnar havn**
**Postboks 103**
**110 Tórshavn**

í seinasta lagi 16. juni 2000.

# Pedagogar og hjálparfólk

**Søkt verður eftir 2 pedagogum og 2 hjálparfólkum til Býlingshúsið Inni á Gøtu.**

**Stovnslýsing**
Í barnagarðinum ganga 42 børn í aldrinum 3-7 ár, skift sundur á tveimum stovum. Hølisviðurskiftini og umhvørvið um barnagarðin eru sera góð, og eru tí góðir møguleikar at gera eitt mennandi pedagogiskt arbeiði.

**Størvini**
Talan er um eitt pedagogstarv 30 tímar um vikuna frá 1. august 2000. Eitt pedagogstarv fyri starvsfólk í barnsburðarfarloyvi 35 tímar um vikuna frá uml. 1. juli 2000. Eitt hjálparfólkastarv 20 tímar um vikuna frá 1. august 2000. Eitt hjálparfólkastarv fyri hjálparfólk í farloyvi 30 tímar um vikuna frá 1. august 2000.

**Førleikakrøv**
At tú ert við í arbeiðinum at skapa tryggar og mennandi umstøður fyri børnini í gerandisdegnum At tú arbeiðir sjálvstøðugt, hevur góð samarbeiðsevni, er virkin og røkin. At tú hevur ein hugburð merktan av opinleika fyri at vilja menna teg í arbeiðinum saman við børnum, foreldrum og starvsfeløgum.

**Setunarviðurskifti**
Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Føroya landsstýri. Um pedagogar ikki verða settir í pedagogstørvini, verða hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv.

**Meir fæst at vita**
Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Jóhannu M. Hansen, leiðara, tlf. 317701 lok. 10, ella Katrin Petersen, samskipara, tlf. 315160.

**Umsókn**
Umsókn saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Býlingshúsinum Inni á Gøtu, Ovaragøta 30 B, 100 Tórshavn í hendi í seinasta lagi 13. juni 2000.

Tórshavnar kommuna

# Tógverksskeiðið

**v/ Ole Magnus**

Vegna forfall verður skeiðið útsett til september mánaða.

**Felagið »Teinæringurin«**

# Timburmenn søkjast

til arbeiði í Norra í óásetta tíð. Skulu helst kunna byrja 7. juni. Góð løn + akkord.

Áhugaði kunnu ringja til

**FK-smíð**
Tlf. +47 90637898
ella + 47 91834052



# Útbjóðing

## IRF L/F

## Endurnýtslubygningur

Í samband við bygging av endurnýtslubygningi í Lorvík verða vegna IRF fylgjandi arbeiðstøkur bodnar út í almenna lisitatión.

Høll við grundvídd 20x42m, hæddin inni í høllini er frá 6 - 11 m. Stuðlamúrur 5 - 6m høgur móti lendi, stálkonstruktión við plátuklæðing.
Í eystara enda á høllini verða tríggjar hæddir uppbygdar við betongelementum, har skrivstovur til seinni nýtslu verða gjørdar.

Bygningurin verður gjørdur sum sjálvstøðug eind, men allar installatiónir verða førdar fram frá verandi bygningi.

Betongarbeiði, plásstoypt betong, betongelementir og stálarbeiði

El- arbeiði

HVS- og ventilatiónsarbeiði

Timbur- og múraraarbeiði

Fasadu- og takarbeiði, vindeygu og hurðar

Gólvbelegningur, málaraarbeiði

Útboðstilfarið kann bíleggjast á Verkfrøðingastovuni á telefaks nr. 31 12 93 saman við kvittan fyri, at kr. 1.000,- eru settar inn á konto nr. 1.559.585, hjá IRF í Føroya Banka. Tilfarið skal verða umbiðið í seinasta lagi 31.05.200 og verður tað sent teimum bjóðandi fyrst í viku 23.

Lisitatiónin verður 27.06.2000, kl. 11.00 á skrivstovuni hjá IRF í Lorvík. Tilboðini verða latin í afturlatnum brævbjálva merktur IRF endurnýtslubygningur, og arbeiðstøkan verður tilskilað.

**Rambøll, 2830 Virum**
**Verkfrøðingastovan, 100 Tórshavn**

# Bilur til sølu



Rover 214, árg. 1997, myrkagráur, nýlakeraður, koyrt 35.000 km. Sera væl viðfarin. Ikki er roykt í bilinum.

**Tlf. 44 50 08,** best eftir kl. 18

# Stór sethús í Vágum ynskjast til leigu

Serstovnadeildin sóknast eftir einum stórum sethúsum í Vágum, har møguleiki er fyri at hava vardan verkstað fyri brekað fólk í oynni.

Fyri einum ári síðani byrjaðu vit eitt dagtilboð fyri brekað í skúlanum í Sørvági, men nú kundu vit hugsað okkum at fingið okkara egnu hølir.

Tí ynskja vit at leiga eini stór sethús, sum kunnu rúma verandi virksemi og vónandi øktum virksemi í framtíðini. Góður leigusáttmáli kann útvegast.

Áhugað kunnu venda sær til starvsfólkini á Dagtilboðnum í Vágum, tlf. 28 33 00, ella til Bjarna Clementsen á tlf. 31 54 26.

**Serstovnadeildin**
Sigmundargøtu 5
FO-100 Tórshavn

# Suðuroyar Ellis- & Røktarheim

Vegna farloyvi verður søkt eftir sjúkrahjálpara/sosial- & sunnheitsassistenti til fulltíðarstarv í skiftandi vaktum frá 1. august 2000 til 31. juli 2001.

Løn- & setanartreytir sambært sáttmála millum Sjúkrahjálparafelag Føroya og Fíggjarmálastýrið.

Nærri upplýsingar viðvíkjandi starvinum fáast við at venda sær til fyristøðukvinnuna tlf. 37 16 66 lokal 147.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum v.m. skal sendast til:

**Suðuroyar Ellis- & Røktarheim**
**Fyristøðukvinnan**
**800 Tvøroyri**

innan 15. juni 2000.

zarepta

# ZAREPTA LEGURNAR 2000

**Ætlanin er, um Gud vil, at byrja summarlegurnar í ár leygardagin 1. juli.**
**Nær, tær ymisku legurnar vera, sæst á tekningarseðilinum**

*Seinasta freist:*
Tekningin til barna- og ungdómslegurnar má vera okkum í hendi í seinasta lagi mikudagin 14. juni.

*Tekningarseðilin:*
Fyll seðilin út og send hann til:
Zarepta-legurnar
FO-385 Vatnsoyrar

Sosialurin - 311820

**Tað er við stórari gleði, at vit, 36. árið á rað, bjóða til legur í Zarepta**

| Lið | Fornavn | Eftirnavn | Føðingardagur | Kr. |
|---|---|---|---|---|
| ❒ Lið 1: 01. juli - 07. juli 16 - 17 ár | | | / 19 | 550,- |
| ❒ Lið 1 01. juli - 07. juli 16 - 17 ár | | | / 19 | 550,- |
| ❒ Lið 2: 08. juli - 14. juli 14 - 15 ár | | | / 19 | 550,- |
| ❒ Lið 2: 15. juli - 21. juli 14 - 15 ár | | | / 19 | 550,- |
| ❒ Lið 3: 15. juli - 21. juli 13 ár | | | / 19 | 500,- |
| ❒ Lið 3: 15. juli - 21. juli 13 ár | | | / 19 | 500,- |
| ❒ Lið 4: 22. juli - 28. juli 12 ár | | | / 19 | 500,- |
| ❒ Lið 4: 22. juli - 28. juli 12 ár | | | / 19 | 500,- |
| ❒ Lið 5: 29. juli - 04. aug. 11 ár | | | / 19 | 500,- |
| ❒ Lið 5: 29. juli - 04. aug. 11 ár | | | / 19 | 500,- |
| ❒ Lið 6: 05. aug. - 10. aug. 10 ár | | | / 19 | 375,- |
| ❒ Lið 6: 05. aug. - 10. aug. 10 ár | | | / 19 | 375,- |
| ❒ Lið 7: 12. aug. - 17. aug. 9 ár | | | / 19 | 375,- |
| ❒ Lið 7: 12. aug. - 17. aug. 9 ár | | | / 19 | 375,- |

Gøta/býl. v.m.

Viðm.:

Tel. | Sjúkrakassanummar | Sjúkrakassanummar hjá foreldrum

Ref. nr. | Undirskrift foreldra ella verja til barnalegurnar